# Pál dragnaði skjótt



*Pál Joensen var væl við fyrstu 400 metrarnar, men dragnaði síðan nakað. Tað er tó eitt stórt bragd at vágbingurin yvirhøvur hevði svomið seg í finaluna*

**SVIMJING** Pál Joensen var við teimum fremstu fyrstu 400 metrarnar. Síðan dragnaði hann, og vágbingurin átti ein friðarligan leiklut

Uni Holm Johannesen

Tað er sagt, at tað var eitt stórt bragd, at Pál Joensen yvirhøvur hevði svomið seg í finaluna.

Tað er sjálvsagt rætt.

Men úrslitið í finaluni var ikki nøktandi. Fleiri høvdu vónir um heiðursmerki, men vágbingurin var langt frá ovastu plássunum.

### Misti skjótt

Pál Joensen svam undir liðini á Glæsner, Colbertaldo og Gyurta fyrstu 400 metrarnar.

Tá dragnaði vágbingurin í smáum, og hann gjørdi lítið um seg. Glæsner, Colbertaldo og Gyurta togaðust um oddasessin. Glæsner var fremstur leingi, men hinir fóru frá honum, tá 1100 metrar vóru lagdir afturum.

Glæsner vann seg aftur, og kom fyrstur á málið í finaluni.

## TOPP 20 SVIMJARAR Í HEIMINUM

| | | |
|---|---|---|
| 1. Oussama Mellouli | Tunesia | 14:24.16 |
| 2. Mads Glæsner | Danmark | 14:29.52 |
| 3. Gergely Gyurta | Ungarn | 14:31.47 |
| 4. Federico Colbertaldo | Italia | 14:33.92 |
| 5. Peter Vanderkaay | USA | 14:35.25 |
| 6. Sébastian Roualt | Frakland | 14:42.79 |
| 7. Ahmed Mathlouthi | Tunesia | 14:43.25 |
| 8. Lucas Kanieski | Brasilia | 14:45.51 |
| 9. Sean Ryan | USA | 14:46.38 |
| 10. Heerden Herman | Russland | 14:50.10 |
| 11. Samuel Pizzetti | Italia | 14:52.81 |
| 12. Jun Dai | Kina | 14:53.80 |
| **13. Pál Joensen** | **Føroyar** | **14:54.94** |
| 14. Cristian Quintero | Venezuela | 14:58.50 |
| 15. Jose Enderica Salgado | Spania | 15:04.41 |
| 16. Alejandro Gomez | Venezuela | 15:06.80 |
| 17. Sergiy Frolov | Ukreina | 15:07.74 |
| 18. Sergey Bolshakov | Russland | 15:09.15 |
| 19. Christian Scherubl | Eysturríki | 15:12.63 |
| 20. Ventsislav Aydarski | Bulgaria | 15:16.37 |





*Mads Glæsner*

# Glæsner er ovurfegin

**SVIMJING** Mads Glæsner svam eitt silvurheiðursmerki til Danmarkar. – Hetta er mítt besta úrslit nakrantíð, sigur hann

Uni Holm Johannesen

Tað var tætt í oddinum.

Mads Glæsner, Frederico Colbertaldo og Gergely Guerta togaðust um oddasessin. Glæsner legði bragdliga fyri, áðrenn hinir fóru frá honum, men danin stríddi seg aftur og kom fyrstur á málið í finaluni.

Tíðin hjá Glæsner var 14.29.52.

Tað var gott og væl fimm sekund aftan fyri Oussama Mellouli, Tunesia, sum svam teinin við tíðini 14:24.16 í innleiðandi riðlinum.

Hann var ikki við í finaluni, tí FINA, altjóða svimjisambandið, kendi einki til tilmeldingartíðina. Tíðin, hann svam í innleiðandi riðlinum, stíð við, og hann fekk tí handað gullheiðursmerki.

Men silvurheiðursmerki hjá Glæsner er sanniliga eitt bragd, heldur hann sjálvur.

– Tað er eingin ivi um, at hetta er mítt besta úrslit nakrantíð. Eg fari ongantíð at gloyma hetta, sigur Glæsner við Ekstra Blaðið.

22 ára gamli danin vísir á, at seinastu 500 metrarnir vóru teir strævnastu í hansara lívi.

– Eg vildi ikki geva upp. Eg vildi ikki fara vónbrotin til hús. Eg skuldi hava eitt heiðursmerki, sigur hann.

*uni@sosialurin.fo*

# FINA kennir ikki tilmeldingartíðina

Oussama Mellouli var ikki við í finaluni í 1500 metra frí.

Hann vann tó gullheiðursmerki.

FINA, altjóða svimjisambandið, boðaði frá, at hansara tilmeldingartíð var ókend.

Mellouli svam í innleiðandi riðlinum og kom á málið við tíðini 14:24:71.

Tað er næstbesta tíðin í heiminum í ár. Mellouli hevur, sambært svimjing.com, verið slitin seinastu vikurnar. Tað var eitt vónbrot, at hann ikki vann seg í finaluna í 400 metra frí undir World Cup fyri trimum vikum síðan.

Hann reisti seg væl og virðiliga aftur hesaferð.